# Bátafelagið byggir felagshús á Bakka



**- Tað er eitt stórt ynski hjá flestu av limum felagsins at fáa tak yvir høvdið, sigur Charles Jacobsen.**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*

Bátafelagið á Bakka er eitt rættiliga nýtt felag. Tað er stovnað, 7. oktober 2001. Á stovnandi fundinum møttu umleið 30 mans, og í dag hevur felagið einar 50 limir.

Endamálið hjá felagnum er at fylkja allar báteaigarar, at skipa fyri tiltøkum, og at veita limum og vitjandi báteaigarum tænastur.

Charles Jacobsen, formaður felagsins, sigur, at nógvur aktivitetur er við bátahylin á Bakka um summarnar.

- Ein av orsøkunum til, at felagið varð sett á stovn, var, at eingir fasilitetir vóru við bátahylin, eitt nú vatn, el og wc.

Felagið hevur eisini ein umhvørvissetning, sigur Charles og vísir á, at hesin er at halda pláss og bátahylin so reinan sum til ber.

## Putlast við bátarnar

Formaðurin í Bátafelagnum sigur, at fleiri av teimum, sum eiga bát, eru komnir nakað uppí árini og eru partvís farnir av arbeiðsmarknaðinum.

- Hesir hava kanska ikki so nógv at takast við; tí eru teir ofta við bátarnar og putlast. Hjá hesum monnum hevði tað verið sera hugnaligt at havt eitt undirhús at sitið og prátað í og møguliga tikist við okkurt. Í húsinum verður tískil eisini eitt arbeiðsrúm.

Charles dylur ikki, at tað er eitt stórt ynski hjá flestu av limum felagsins at fáa tak yvir høvdið.

- Og tað fáa vit nú, áðrenn langt um líður, leggur hann aftrat.

Bátafelagið hevur bæði fingið grundøki og byggiloyvi, og tekning er gjørd av einum Felagshúsi, bæði innan og uttan.

## Spakin settur í

Charles Jacobsen sigur, at spakin er settur í norðanfyri kappróðrarneystið á Bakka, og ætlanin hjá felagnum er, at felagshúsið skal verða innilokað í hesum árinum.

- Vit hugsa okkum, at felagshúsið eisini kann geva børnunum og møguliga útlendskum ferðafólki nakað við tað, at tey her kundu lært at knýtt knútar, sett segl og annað, sigur formaðurin í Bátafelagnum á Bakka. Fimm nevndarlimir og tveir eykalimir eru í felagnum; tann yngsti er 22 og tann elsti er 72 ár.

EYSTANSTEVNAN 2002

# Tel bátaseymir og vinn eina fartelefon



*Á eystanstevnu kunnu fólk kappast um at vinna eina fartelefon.*
*Tú metir um, hvussu nógvir seymir eru í einum tríbekki, sum kemur at standa í túninum hjá Arbeiðarafelagnum Hæddini.*
*Tann, ið gitir best, vinnur eina fartelefon*

**Á eystanstevnu bjóðar Bátafelagið á Bakka til kaffi, breyð og undirhald í hølunum hjá Arbeiðarafelagnum Hæddini.**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*

Á eystanstevnu skipar Bátafelagið á Bakka fyri kafé og øðrum tiltøkum í bygninginum hjá Arbeiðarafelagnum Hæddini og í túninum uttanfyri.

Opið verður í Hæddini leygardagin og sunnudagin frá kl. 16 til 22. Leygarkvøldið undirhalda Birgir og Jónsvein við sangi.

Í túninum hjá Hæddini fer Bátafelagið at hava ein tríbekk standandi, har fólk kunnu meta um, hvussu nógvir seymir er í honum. Gjaldið fyri at sleppa at meta um talið av seymi, verður einar 20 kr. og tann, sum er nærmastur, vinnur eina fartelefon. Gita fleiri sama tal, sum er tað nærmasta, verður lutakast um, hvør vinnur telefonina.

## Peningur til neyst

Tríbekkin hevur Bátafelagið keypt av Skipanesi, og felagið er sera takksamt fyri, at tey, ið áttu bátin, vildu selja hann so bíliga. Báturin, sum er smíðaður av Símuni Jóhan Wolles á Eiði, er nú málaður og klárur at seta niðan í túnið hjá Hæddini.

Ein sera fittur bátur og ein fongur hjá Bátafelagnum á Bakka.

Formaður felagsins, Charles Jacobsen, sigur, at allur peningurin, sum kemur inn í sambandi við tiltakið í Hæddini, fer til bygging av einum felagshúsi, sum verður bygt norðanfyri neystið hjá róðrarfelagnum á Bakka.

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 14. juni til hósdagin 20. juni

# Botnurin




*Liðskiparanir Lena Anderssen og James Olsen trína treystliga framaftur á skíggjan leygarkvøldið. Hetta merkir, at tann heldur skeiva undirhaldssendingin »Botnurin« enn einaferð roynir at undirhalda. Hesaferð fáa tey hjálp frá Dánjali Rein, Kristiani Joensen, Kára Sólstein og Fróða Clementsen. Lið A hjá Lenu Anderssen vann seinast, men hetta tykist ikki at hava gjørt vertirnar, Trónda Vatnhamar og Jens Tummas Næss, minni ørkymlaðar.*

# Garpatáttur

*Útvarpið fer í summar at lesa skaldsøguna Garpatáttur eftir íslendska skaldið Halldór Laxness. Laxness fekk í 1955 Nobelvirðislønina sum skaldsøgurithøvundur, ikki minst fyri hesa skaldsøguna, sum á íslendskum eitur Gerpla. Hjúnini Tóra Tóroddsdóttir og Martin Næs hava nú týtt hana til føroyskt og givið henni heitið Garpatáttur. Søgan kom út í 1952. Hon fer fram fyrst í 11. øld og fylgir tveimum gørpum, ið eru høvuðspersónar í íslendingarsøguni Fostbræðrasøgu, Torgeiri Hávarssyni og Tormóði kolbrúnarskaldi. Leikpallurin er Ísland, Grønland, Noregur, Svøríki, Danmørk, Ongland, Írland, Valland, Rómaríki og londini eystan fyri Eystrasalt.*

*Bókin viðger speirakendi hetjumyndina og tey menniskju, ið vilja ráða og valda í hesum heimi, bæði átrúnaðarliga og verðsliga. Rithøvundurin hevur sum fáur sett seg inn í miðaldarsøguna og fornsøgu okkara, og við bókini fæst ein øðrvísi og meiri livandi mynd av víkingatíðini.*

*Hans Tórgarð lesur fyrsta part av Garpatátti í útvarpinum sjálvan tjóðardag Íslands, mánadagin 17. juni klokkan 19.00.*




## Fres - Ferðslutrygd




## Boyggi




## Borð um borð




## Gekkur

